# -Varið tykkum fyri multinatio-nalu gigantunum



Poul Nilson, orkuframsøgumaður javnaðarfloksins á fólkatingi - Verður oljudirektivið í EF samtykt, so eiga Føroyar heilt givið at gloyma alt um at fara upp í EF

*-Vit ætla ikki at broyta nakað við tað, sum longu er samtykt. Danmark skal ikki til at eiga undirgrundina aftur. Avgerðin, sum er tikin, stendur við. Men tað er brúk fyri einum samarbeiði millum føroyingar og danir á oljuøkinum.*

*Hesi avgjørdu orðini eigur fyrrverandi danski orkumálaráðharrin og nú orkuframsøgumaður í danska javnaðarflokkinum, Poul Nilson. Sosialurin hevur hitt hann á máli á Christiansborg, har hann í løtuni er sera upptikin av donsku oljuboringum í Norðsjónum. Poul Nilson er nevndarlimur í fleiri av teimum stóru og týðandi almennu oljufeløgunum.*

*Hann heldur, at føroyingar eiga sjálvandi at kanna allar møguleikar fyri samarbeiði við altjóða feløg, men hann biður okkum kortini vara okkum fyri teimum multinationalu gigantunum.*

*-Samarbeiði við Danmark er júst lykilin til eina støðu, har føroyingar sjálvir vera við til at taka tær týðandi avgerðirnar.*

Nú er Danmark limur av EF og tað hevur verið sagt, at tað í EF finnast nógvir grunnar, sum høvdu kunnað goldið pengar til Føroya, um Føroyar vóru limir í EF. Tað hevur verið sagt, at tað millum fólkatingslimir er eitt tungtvigandi ynski, at Føroyar gesast limur í EF. Hvørja viðmerking hevur Poul Nilson, fólkatingslimur til hetta!

-Nú kann eg ikki úttala meg vegna alt fólkatingið. Men lat meg í hesum sambandi nevna tað sokallaða oljudirektivið í EF. Hetta snýr seg um frælsi hjá teimum einstøku limalondunum at stýra gongdini í undirgrundini. Um vit nú hugsa okkum, at hetta oljudirektiv verður samtykt, so fer tað at vera ein sera góð grundgeving hjá Føroyum til at halda seg uttan fyri EF. Tað er nevniliga sera avgerandi fyri framtíð Føroya, at føroyingar sjálvir gera av, hvat skal henda á hesum týðandi økinum.

### Veto

Poul Nilson sigur, at Danmark vónandi fer at leggja veto móti umrødda uppskoti.

Hann vísir á, at hetta at fáa nakrar pengar her og her frá nøkrum grunnum í EF kundi verið dýrtkeypt, um tað so merkti, at Føroyar ikki sjálvar kunnu stýra gongdini í undirgrundini í framtíðini.

-Fer Danmark at bera seg rætt at í hesum máli og niðurleggja veto móti oljudirektinum tann 10. desember, so haldi eg, at tað er nógv, sum talar fyri, at Føroyar áttu at blivið limur í EF.

Poul Nilson byggir hetta á tær sera positivu royndirnar Danmark hevur av limaskapi í EF. -Tað snýr seg um at vera innan fyri í klubbanum av nútímans samfeløgum.

### Ríkisfelagsskapurin skal tryggja tykkum

*Nú hevur Uffe Elleman Jensen sagt, at danir hava ikki ráð til at lata Føroyar fara á húsagang. Hvat heldur tú um tað?*

-Tað er als ikki ein spurningur um at hava ráð. Vit vilja als ikki hava at tað skal henda. Vit hava ein ríkisfelagsskap, og hann skal tryggja hetta.

Poul Nilson er ein av teimum donsku fólkatingsmonnunum, sum var sera ivasamur, tá, at táverandi danska stjórnin gav føroyingum rættin til undirgrundina.

-Eg haldi, at tað hava verið nógvar tulkingar av, hvat eg meini. Eg havi ikki verið ímóti, at undirgrundini gjørdist føroyskt sermál. Tað eg havi sagt er, at tað við síðuna av tí juridiska í hesum spurningi eigur at verða stovnað eitt samarbeiði. Og tað hevur eisini nakað at gera við møguleikarnar fyri at fáa føroyingar í tey røttu arbeiðini.

### Ansið eftir teimum multinationalu

Mín meining er nógv litað av, at eg havi brúkt ein stóran part av lívi mínum til at arbeiða við hesum tingunum og veit, hvussu týdningarmikið tað er fyri eitt lítið samfelag, sum stendur upp ímóti hesum stóru multinationalu gigantunum, at kunna sjálvt. Kann ein tað ikki sjálvur, so gerst eins samráðingarstøða verri og autoritetur nógv minni.

Vit ætla ikki at broyta nakað við tað, sum er hent. Danmark skal ikki til at eiga føroysku undirgrundina. Avgerðin, sum er tikin, stendur við. Alt annað hevði verið burturvið.

Men tað er brúk fyri einum samarbeiði, har ein kann skapa okkurt, sum kann virka sum ein praktiskur partnari. Meira út í æsir vil eg ikki útgreina hetta nú.

Poul Nilson heldur annars, at tað er rætt av føroyingum og skilagott at kanna møguleikarnar fyri samarbeiði við allar hugsandi partar. -Tað, sum er mest umráðandi, er at gera sær greitt, hvussu ein stýrir gongdini og hvussu ein plaserar síni egnu samfelagsáhugamál í virkseminum. Eg haldi tað er sera týðandi at bjóða øllum áhugaðum pørtum upp í eitt samarbeiði, men tað má vera gjørt soleiðis, at ein sjálvur kann stýra gongdini.

Royndirnar eru tær aðrastaðni frá, at oljufeløgini eru ymisk og hava ymsar metingar og eisini hava síni egnu áhugamál at røkja.

Poul Nilson viðgongur annars, at eitt samarbeiði við Danmark er helst tann einasti mátin, har føroyingar sjálvir veruliga koma at hava eitt orð at siga

-Samarbeiði við Danmark er júst lykilin til eina støðu hjá føroyingum, har tit sjálvir vera við til at taka tær týðandi avgerðirnar. Tí vil eg avgjørt mæla til eitt slíkt samarbeiði á oljuøkinum sigur fyrrverandi danski orkumálaráðharrin og orkupolitisku framsøgumaðurin hjá danska javnaðarflokkinum í samrøðu við Sosialin.

**jan**




**SEYÐASKINN**

Eg taki ímóti skinnum aftur í ár.

**Thorvald Lützen**

Landavegur 106, Havn - Tlf. 15056

**Umsjónarmaður**

Søkt verður eftir

**Umsjónarmanni til Válakei**

at byrja frá 1. nov. 1993. Umsóknir skulu verða Kvívíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 20. okt

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna í avgreiðslutíðini, mánadag frá kl. 11–13, miku- og friggjadag frá kl. 18–20

**Kvívíkar Kommuna**